Kygg og Koyr

Sjónvarp Føroya

Fríggjadagin kl. 20.55:

Hart arbeiði í Sibiria



Í gummibáti á Bashkaus

Russar og amerikumenn hava í felag verið ein siglitúr eftir Bashkaus-ánni í Altai-fjøllunum í Suðursibiriu. Hetta var ein vandamikil túrur. Einastaðni varð ein flaki kroystur millum fjøll og mundi sokkið, og ofta noyddust menninir at bera førini tvørtur um hálar klettar fram við áarbakkanum. Á vegnum fingu menninir av og á samband við teir erpnu Altai-fjallabúgvarnar, sum búgva har nærhendis. Hesir Altai-fjallabúgvarnir halda seg fyri tað mesta fyri seg sjálvar og vilja helst ikki koma ov nær øðrum fólki.

Tónleikurin í hesi sendingini er altaiskur.

Leygardagin kl. 16.35:

Undirhald



Hans-Otto Bisgaard



Gwen Wisti

Hans-Otto Bisgaard er farin í holt við eina nýggja tónleikasendirøð úr ungdómshúsinum »Stenladen« í Ballerup. Við lið sína hevur hann Gwen Wisti og Peter Larsen. Millum teir fyrstu gestirnar eru Dodo and the Dodos og írski bólkurin »Hothouse Flowers«.

Leygardagin kl. 17.30:

Tey grava

Fyri 1500 árum síðani vórðu kostnaðarmikil vápn og skip løgd út í Nydam Mose sum offurgávur, og hetta er evnið, hesar triggjar sendingarnar snúgva seg um.

Piet van Deurs leggur til rættis.

Leygardagin kl. 21.00:

Red River - am. western

Í einari lítlari bygd nærhendis mexikanska markinum, Lonesome Dove, búgva tveir fyrrverandi cowboyar, Gus McCrae (Robert Duvall) og Woodrow F. Call (Tommy Lee Jones). Ein dagin fær Woodrow eitt hugskot. Saman við Gus og hinum vinmonnunum ætlar hann at reka eitt neytafylgi til Montana. Og tað er hesi ferðini vit skulu fylgja . . .



Robert Duvall

Leygardagin kl. 22.30:

Eystursjógvurin - 1:6

Tað, sum vit í dag kalla Eystursjógvurin, uppkyknaði fyri uml. 4.000 árum síðani, men hann broytist alsamt. Um nøkur túsund ár hevur jarðarbotnurnar lyft seg so mikið, at Eystursjógvurin hvørvur.

Sunnudagin kl. 20.35:

Tann fremmandi fuglurin - 2:4

Mary McKenzie er farin frá manni sínum, sum er onglendingur. Hon býr nú í Tokyo sum »konkubina« fyri tann japanska Kentaro Kurihama. Tað er torført hjá Mary at venja seg til hetta nýggja umhvørvið.



Mary (Samantha Bond) og Kurihama greivi hava fingið ein son



Nicholas, Grant, Casey og Max

Leygardagin kl. 23.00:

Úrmælingarnir

Fýra abbasynir hjá kendum týskum herovastum í Hitlersa tíð hittast í Zürich, har teir krevja sín arv: ein krógvaðan »skatt«. Men úrmælingaleiðarin, Jim Phelps, fær boð um at forða ætlanum teirra, sum kunnu elva til eitt nazi-heimsvald.

Sunnudagin kl. 22.25:

Á húsagang - 1:6



Paul Nicholas

Paul Nicholas, sum mong minnast frá sjónvarpssendirøðini »Bert góðir vinir«, er nú aftur sum handilsmaðurin Neil Walsh. Hann er snildur, men tíverri um at fara á húsagang. Kona hansara, Sheila (Phyllis Logan) vil skiljast, men hon sleppur ikki . . .

Týsdagin kl. 21.00:

Kvinnulyndi - da. filmur

Søgan snýr seg um ta 35 ára gomlu Lene (Lotte Tarp). Lene er gift og býr í einum góðum húsum, men tilveran tykist henni keðilig. Eitt kvøldið hittir hon í eini veitslu ein amerikumann, og hon kennir seg drigna at honum.


Hvat skal hon gera? Skal hon fara við amerikumanninum til Rom — fara frá manni sínum og 13 ára gamla soninum?

Svenski leikstjórin Stig Bjørgman hevur skriva myndaritið og leikstjórnað.

Mikudagin kl. 18.15:

EM-fótbóltur

Danmark—Føroyar



Mikudagin kl. 21.05:

Filmurin um Van Gogh



Vincent van Gogh og Christine

Í ár eru 100 ár liðin, síðani Vincent van Gogh doyði. Filmurin lýsir lív hansara, sum var ein bardagi við ymiskum trupulleikum, sum at enda førdu til sjálvmorð.

Kirk Douglas spælir Van Gogh og Anthony Wuinn spælir málarin Gauguin, sum var van Gogh ein dyggur stuðul.

Hósdagin kl. 22.15:

Ungur solistur

Altjóða kapping. Fimm ungir tónleikarar undir 19 ár skulu kappast um 1. virðisløn í altjóða solist kappingini, sum fer fram í Musikverein í Wien.

Peter Borgwardt sigur frá.